# Heimskendir jassarar í Vágsbotni

**Ein frálík jasstrio saman við einum framúrskarandi jasssaksofonleikara hetta er uppskriftin, tá Havnar Jazzfelag í kvøld bjóðar til jasskonsert í Miðlahúsinum.**

KONSERT
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo



Jass trummuleikarin Axel Riel fer í kvøld á pallin í Miðlahúsinum í Vágsbotni, við sær hevur hann vanligu fylgisveinar sínar klaverleikaran Heina Hansen og bassleikaran Jesper Lundgaard umframt gestatónleikaran Benjamin Koppel. Talan er sostatt um eina jasskvartet í absoluttum heimsflokki. Riel, Hansen og Lundgaard hava í nøkur ár spælt undir navninum Axel Riel Trio, og fyri roynda trummleikarin er trioin ein dreymur, ið gerst veruleiki. Saman hevur trioin gjørt fløguna What Happened? Ið fekk sera góða móttøku.

Ummælarin hjá DR Celine Hastrup skrivaði:

- Jeg har altid sindssygt godt kunnet lide Alex Riel. Der er få trommeslager der som han kan lyde så afsindigt veloplagte, og hans spændvidde fra direkte no-nonsense swing over fed rock og turbulente og farvemættede eksplosioner til klangfuldt, fint balladespil kan man bare tage hatten af for.

Kjeld Frandsen skrivaði í Berlingske Tidende:

- Med bassisten Jesper Lundgaard som sekundant swinger det ganske guddommeligt, og der bliver plads og luft til overrumplende flotte udfoldelser fra det unge stortalent, pianisten Heine Hansen.

Tað er Havnar Jazzfelag, ið skipar fyri konsertini.

Konsertin er kl. 21.00 í kvøld. Atgongumerki fáast við dyrnar á 80,-

# Villmenn samstarva við Rasmus

**Nýggja fløgan hjá Villmonnum er farin til prentingar og nú ber til at hoyra fyrsta lagið á myspace, lagið Kvølur er skapt í samstarvi við Rasmus Rasmussen**

FLØGUÚTGÁVA
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Nýggja fløgan hjá Villmonnum ljóðblandað og farin til prentingar. Heitið á henni verður Villmannatjóðin. Fyrsta lagið av fløguni, Kvølur liggur nú á myspace. Lagið er skapt í samstarvi við Rasmus Rasmussen.

Rasmus Rasmussen er arkitekturin handan flest allan tónleikin hjá Makrel og varð í 2005 valdur til Føroya besta gittarleikara á Atlantic Music Event.

- Lagið er merkt av sorgblídni, og er fult av pínu. Villmenn vilja ogna hetta lag til allar minnilutar, sum ikki kenna seg væl í Villmannatjóðini, skriva Villmenn í tíðindabrævið. Tit kunnu hoyra lagið á myspace.com/villmenn.

- Navnið villmannatjóðin sipar til Føroyar. Sangirnir á fløguni eru hendingar og persóntypir, sum ein kennir aftur úr gerandisdegnum. Fløgan er eisini ein lýsing av kenslum, sum fleiri persónar hava í Føroyum. Hon roynir at vísa á, at ikki øll hava tað gott. Okkara samfelag er eitt tílíkt, har tann sterkasti vinnur. Meirilutin traðkar niður á tey, sum eru øðrvísi ella hava øðrvísi hugsanir enn restin av fjøldini. Tískil eru Føroyar ein verulig villmannatjóð, skriva Villmenn m.a. og halda fram:

At vera ein villmaður setir ein í samband við nakað primitivt, og tí sipar fløguheitið til, at Føroyar eru eitt nokkso primitivt samfelag sum støðan er.

- Vit kunnu nú avdúka, at fløguhúsin nokk kemur at traðka onkran á tærnar. Hann byggir víðari á heitið villmannatjóðin, og er annar hornasteinurin í tí heildarkonsepti, sum Villmannatjóðin er. Men hetta verður ikki tann seinasta avdúkingin. Seinni fara vit at avdúka nakað stórt, sum helst kemur at kollvelta tað Føroyska samfelagið. So nú er bara at bíða spent, skriva Vilmenn víðari.

Tað er Terji Rasmussen, ið er framleiðslustjóri á Villmannatjóðini, og hetta skuldi boða frá góðum. Terji hevur eitt heilt serligt oyra fyri vágasoundinum. Hetta kundi m.a. upplivast á fløguni Jakkin, ið Terji framleiddi við Tinganest oddamanninum Jóan Jakku Guttesen fyri nøkrum árum síðan, eisini var Terji maðurin, ið tók upp og ljóðblandaði Eitt veittiii við Orkestrinum her vestriii.

Umframt vanligu villmennirnar, hevur bólkurin fingið hjálp á fløguni frá Føroyameistaranum á trummum, Rógva á Rógvu og altso eisini frá Rasmusi Rasmussen á hesum eina lagnum.



*Villmenn hava fingið nógva og køna hjálp á nýggju fløguni.*



*Wrestling er temaði á snøgga húsanum á fløguni Sonny vs. Gigi*

# Brother and Sister koma til Føroyar

**Tvey av kendastu andlitunum í Danmark Gigi og Sonny Fredie Pedersen spæla í Cippo og í Mentanarhúsinum í Fuglafirði fyrsta vikuskiftið í desember.**

KONSERT
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Gigi og Sonny hava verið stjørnur frá barnsbeini. Uppvaksin í dansistudionum hjá foreldrunum hava tey dansað, frá tey lærdu at ganga. Tilsamans hava tey vunnið 28 donsk meistaraheiti í ítróttardansi og fleiri heimsmeistaraheiti. Sum fimm ára gomul fóru tey undir klaver- og sangfrálæru. Bæði hava eisini royndt seg sum sjónleikarar og givið fløgur út hvør sær. Í 2002 stovnaðu tey bólkin Brother and Sister og gávu fløguna Brother + Sister út. Ein fløga sum fekk góða móttøku, og m.a. seldi rættiliga fitt í fjareystri. Í fjør kom so onnur fløgan hjá systkjunum Sonny vs. Gigi. Fløgan er framleidd saman við heimskenda framleiðsluparinum Cutfather & Joe, ið hava havt 8 løg ovast á enska hitlistanum, og hava arbeitt saman við nøvnum sum Ace of Bace, Santana, Blue, Westlife, Kylie, Peter Andre, Jamelia, Brandy, Christina Millian og Christina Aquilera. Systkini hava skrivað nakað av tónleikinum sjálvi, men samstarva eisini við aðrar sangskrivarar. Jascha Richter úr Michael Learns To Rock hevur skrivað eitt lag, Cutfather & Joe hava skrivað okkurt, eins og Remee, Seebach brøðurnir, Chief 1 og Jud Friedman, ið m.a. er kendur sum maðurin handan ljóðsporið til Bodyguard, hava skriva løg til systkini bæði.

Fløgan Sonny vs. Gigi varð væl móttikin og lá eitt mundið á næst ovastu rók á almenna danska sølulistanum.

Talan er um dansivinarligan popp, ið hevur borið tey á eina umfatandi konsertferð við higartil 73 konsertum, tær flestu kring Danmark. Nú gongur leiðin til Føroyar. Enn eru tey ung Gigi er 23 ár og Sonny er 19 ár. Men royndirnar hjá teimum eru somikið nógvar, at tey fyri tað kundu verið miðaldrandi.

Enn eru tey virkin á nógvum pallum, m.a. eru tey enn virkin sum dansarar bæði í kappingum sum professionellir ítróttardansarar og sum dansilærarar á dansiskúlanum hjá familjuni.

Gigi og Sonny eru kend fyri at geva eitt ordans show, hvørja ferð tey fara á pallin. Tey er von við at vera í fokus og tykjast at trívast í leiklutinum. So talan verður uttan iva um eitt brak av einum poppshowið, tá Gigi og Sonny fara á pall í Føroyum.

Tað er Rúni Djurhuus úr Cippo, ið hevur fingið systkini til Føroyar. Síðan nýggju eigararnir av Cippo keyptu virksemið í fjør hava teir støðugt ment staðið, bæði sum dansistað og sum pallur fyri livandi tónleik. Henda konsert er bert enn eitt stig í hesum arbeiði.